

**TOYOTA COROLLA 2,0 D-4D TERRA B 5D** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** GF 754 **KM:** 66.000
**Árgangur:** 10.09.03 **Seinast sýnaður:** 10.09.03
**Viðmerking:** Elrútar/spegl - Fjartýrt sentrallás - Radio/Fløguspælari
**Kr. 158.000,-**



**SUZUKI IGNIS 1,3** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** SV 919 **KM:** 23.000
**Árgangur:** 01.10.04 **Seinast sýnaður:** 01.10.04
**Viðmerking:** Elrútar/spegl - Fjartýrt sentrallás - Radio/Fløguspælari
**Kr. 119.000,-**



**TOYOTA AVENSIS 1,8 SOL** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** MN 074 **KM:** 142.000
**Árgangur:** 14.04.99 **Seinast sýnaður:** 17.06.04
**Viðmerking:** Elrútar/spegl - Fjartýrt sentrallás - Radio/Fløguspælari
**Kr. 86.000,-**



**MAZDA PREMACY 1,8** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** VJ 750 **KM:** 33.000
**Árgangur:** 06.11.01 **Seinast sýnaður:** 16.02.05
**Viðmerking:** Elrútar/spegl - Fjartýrt sentrallás - Radio/Fløguspælari
**Kr. 128.000,-**



**TOYOTA HILUX 2,4 D 4X4**

**Skrásetingarnr.:** FP 108 **KM:** 57.000
**Árgangur:** 13.12.96 **Seinast sýnaður:** 02.07.04
**Viðmerking:** Fýrahjólstrektur
**Kr. 68.000,-**



**TOYOTA COROLLA 1,3 LINEA NATURA H/B**

**Skrásetingarnr.:** KJ 092 **KM:** 64.000
**Árgangur:** 14.03.01 **Seinast sýnaður:** 11.05.05
**Viðmerking:** Elrútar/spegl - Sentrallás - Radio/Fløguspælari
**Kr. 76.000,-**



**FORD FOCUS 1,6**

**Skrásetingarnr.:** AN 021 **KM:** 70.000
**Árgangur:** 09.03.99 **Seinast sýnaður:** 28.10.04
**Viðmerking:** Elrútar/spegl - Sentrallás - Radio/Fløguspælari
**Kr. 74.000,-**



**TOYOTA YARIS 1,3** — 6 mánaða garanti

**Skrásetingarnr.:** SB 697 **KM:** 74.000
**Árgangur:** 18.09.01 **Seinast sýnaður:** 22.07.04
**Viðmerking:** Elrútar/spegl - Fjartýrt sentrallás - Radio/Fløguspælari
**Kr. 105.000,-**

Fyrivarni verður tikið fyri møguligum prentvillum.

**6 mánaða garanti**

**Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-**
Garanti skipanin, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, ið eygsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
Kom og vitja okkum · landsins fremstu bilasølu.

Vegurin Langi • Hoyvík • Tel. 353040 • Fax 353041
rs@reyniservice.fo • www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F


# Nýggi Smyril stóð royndina



*Nýggi Smyril var royndartúr tað mesta av farnu viku og tað gekk sum tað skuldi*

**Nýggi Smyril hevur verið royndartúr og tað gekk sum tað skuldi. Vit fáa eitt gott skip, sigur skiparin, Hanus Lassen**

NÝGGI SMYRIL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Hann sigldi skjótt og hann er góður at sigla við.

Tað er skoðsmálið, sum nýggi Smyril fær, nú hann hevur verið sín fyrsta royndartúr.

Nýggi Smyril hevur verið royndartúr tað mesta av farnu viku, har allar skipanir eru royndar.

Og nú royndartúrurin var liðugur sunnukvøldið staðfestir Hanus Lassen, skipari, at tað gekk rættiliga væl.

– Alt riggaði at kalla sum tað skuldi. Endamálið við royndartúrinum er at vita, hvussu alt riggar og at finna feilir, so at tað kann rættast og stillast, sum krevst. Og tað er eisini okkurt at rætta og stilla eftir hendan royndartúrin, men tað er ikki nakað álvarsligt, sigur skiparin.

– Allar skipanir umborð eru royndar væl og virðiliga og tað tá ið sæð verður burtur frá smáum rættingum og stillingum, riggaði alt sum tað skuldi.

## Siglur góð 23 míl

Annars sigur Pauli Lassen at nýggi Smyril er avbera góður at sigla við.

– Hann siglur skjótt. Tað mesta, vit vóru uppi á í royndartúrinum var góð 23 míl, sigur hann. Og við bara tveimum motorum gekk hann 18 míl so tann parturin er eisini ílagi.

Hann sigur eisini at tað var ógvuliga friðarligt umborð, tá ið siglt var og at tað vóru lítlar og ongar ristingar í skrokkinum.

Á royndartúrinum var veðrið av tí besta, so tað er ringt at siga nakað um, hvussu gott sjóskip hann er, men skiparin heldur kortini, at hann bar seg væl í sjónum.

Og so hevur nýggi Smyril ein eginleika, sum er ógvuliga hentur hjá einum skipi: Hann er góður at manøvrera við.

– Nýggi Smyril vísir seg at vera ógvuliga góður at manøvrera við. Ein partur av royndartúrinum er eisini at kanna, hvussu góður hann er at manøvrera við, men hóast hann er stórur, er hann ógvuliga knappur, tá ið malast skal runt, ella tá ið hann skal eftir liðini.

Hanus Lassen sigur, at hetta er ein sera góður eginleiki hjá einum skipi í Føroyum at hava, tí her er mangan ringt veður og havnirnar trongar.

– Skipið er stórt, men tað vísur seg at vera eitt gott skip og eg ivist heldur ikki í, at hann er eitt gott sjóskip. Talan er avgjørt um eitt trivaligt og væl gjørt skip, sigur Hanus Lassen.

## Sáttmálin ílagi

Nú er eisini greitt, at semja nú er fingin ímillum maskinmeistarafelagið og Fíggjarmálaráðið um maskinmeistararnir, sum skulu sigla við nýggja Smyrli og sostatt er sáttmálin greiður við øll manningarfeløgini, sum eru umboðað umborð.

Sostatt er greitt, at nýggi Smyril fær ikki somu lagnu sum tvey onnur almenn skip, Brimil og Teistin fingu, tí komu bæði at liggja í vikur og mánaðir av sáttmálaloysi við manningina.

Annars skilst, at tað verður Pauli Larsen, skipari, sum fær heiðurin av at føra nýggja Smyril heim. Talan er um eitt suðuroyarskip og Strandferðslan heldur, at tað skal vera ein suðuroyingur, sum eigur at fáa heiðurin av at koma á Tvøroyri við tí nýggja Smyrlinum.

Sosialurin

Lesið Sosialin
-tað loysir seg!